eitt tómt hugtak hjá mær, sigur Marjun Bæk, sum sigur seg vera fyri núverandi skipan, har parlamentið, tvs. Løgtingið, smíðar lógirnar hjá kirkjuni. Hon er ímóti, at at gera kirkjuna til eina sokallaða synodukirkju.

- Eg eri harðliga ímóti eini synodukirkju. Tað eru tey somu fólkini, ið ganga í kirkju, sum eru í Tinginum. Tað er bara hvør sín uppgáva. Løgtingið skal skapa karmarnar, so skulu vit skipa fyri innihaldinum, sigur Marjun Bæk.

Hvørjar verða høvuðsuppgávurnar hjá bispi?

- Ein tíð fer sum sagt at ganga við at fylgja við lógararbeiðnum, sigur Marjun Bæk, sum annars nevnir tað umsitingarliga arbeiðið, samstarv við kirkjuráðini, setan av nýggjum prestum, bisukupseksamia, har nýggir prestar skulu til eina roynd hjá bispi o.a.

### Betri kor til urguleikarar

Útbúgving er sum nevnt eitt av hjartamálunum hjá Marjuni Bæk, og av tí at prestastarvið kann vera eitt einsamalt starv, fyllir m.a. eftirútbúgving og skeið nógv hjá henni. Sjálv heldur hon, at tilboð um skeið fyri prestar skuldu staðið prestunum í boði hvørt ár.

Hvørjar verða tær størstu avbjóðingarnar hjá føroysku fólkakirkjuni næstu árini?

- At fáa fólk at ganga meira í kirkju og at syrgja fyri, at tey fáa nakað við út aftur, sigur Marjun Bæk.

Hon metir, at tað átti verið meira samvera millum prestarnar, so tey kundu brúkt hvørt annað meira.

Prestur heldur tó eisini, at aðrir partar í kirkjuni áttu at sæð meira til hvønn annan. Marjun Bæk sigur, at sum nú er, eru feløg fyri prestar og kirkjuráðslimir, men at tað sambært henni eisini áttu at verið okkurt forum fyri t.d. kirkjutænarar.

Í hesum sambandi nevnir hon, at tað átti at verið skipað fyri einum kirkjudegi um árið, har allir hesir bólkar savnaðust til at viðgera kirkjunnar viðurskifti.

Somuleiðis metir hon, at urguleikararnir, sum fakfólk, eiga at fáa betri kor í kirkjuni, og at samstarv eigur at verða við Musikkskúlaskipanina um útbúgving av urguleikarum.

### Sálarrøkt og fakligt støði

Sum nevnt brennur Marjun Bæk fyri útbúgving og skeið fyri starvsfólkið í kirkjuni, og hon er sannførd um, at bispur eigur at vera ein teologur, sum er fakliga væl fyri.

Í hesum sambandi heldur hon eisini, at ein universitetsútbúgving eigur at vera minsta krav, sum er eins góð, og tær bestu í norðurlondum.

- Tað fakliga støðið skal vera høgt, bæði fyri at prestur skal røkka langt út, men eisini fyri at kirkjufólkið skal fáa eina ordiliga behandling, sigur ein avgjørd Marjun Bæk, og kemur her inn á spurningin um sálarrøkt. Hon metir nevniliga, at her krevst ein dygg útbúgving og eftirútbúgving.

- Eg haldi, allir prestar skulu hava eyka útbúgving í sálarrøkt áðrenn, teir hava sitið 4 ár í starvi, sigur Marjun Bæk.

- Onnur fólk, eisini uttan fyri Fólkakirkjuna, eru eisini vælkomin til prest, og tað skal vera eitt av argumentunum fyri, at vit hava eina landskirkju, sigur Marjun Bæk, sum grundgevur fyri, at kirkjan skal vera ein kirkja fyri alt fólkið.

- Vit kunnu róliga tosa um tolsemi í okkara kirkju, tí tolsemi er enntá í Bibliuni, sigur Marjun Bæk og sipar m.a. Jóhannes 1,26, har tað stendur: Sí, Guðs lambið, sum ber synd heimsins! ella sum kvíkarprestur sigur tað á látíni: Agnus Dei, qui tollis peccata mundi og verður hetta brúkt í nógvum tónleikaverkum/messum saman við trúarorðum o.ø.

- Vit hava ein tolsaman Gud, hann tolir alt, sigur Marjun Bæk.

**Sosialurin prentar í hesi vikuni samrøður við øll valevnini til biskupsvalið. Í dag verður prátað við Marjuna Bæk, prest**



# Deyður kærleiki til sølu

**Guðrið Hansdóttir gevur í dag fløguna Love Is Dead út. Sostatt fær Føroya fólk høvið, at hoyra eina av okkara allar bestu songkvinnum á egnari útgávu.**

ÚTGÁVA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Heiðrikkur av Heygum hevur gjørt snotiliga fløguhúsan*

Í dag kemur fløgan hjá Guðrið Hansdóttir í handlarnar. Síðan heitislagið, Love is Dead, luttók í kappingini hjá Atlantic Music Event fyrr í ár, hevur hetta verið ein tann mest eftir bíðaða fløguútgávan millum føroyskar tónleikafjepparar. Við síni fantastisku rødd hevur Guðrið longu skrivað seg inn millum Føroya bestu songkvinnur, og er saman við Eivør og Lenu, einasta kvinna, ið hevur verið í uppskoti til Planet heiðurslønina til bestu songkvinnu bæði árini.

Men tað er ikki einans røddin, ið hevur bergtikið, inniligu fólksligu løgini og viðkomandi og rámandi yrkingarnar hava eisini rakt føroyska lyndið mitt á nøsina. Tað er TUTL, sum gevur fløguna út. Hon er tikin upp í Sólarmagni á Velbastað, og Uni Debess hevur tikið sær av upptøkunum. Dennis Ahlgren hevur ljóðblandað. Á fløguni eru 10 løg. Heiðrikkur á Heygum hevur gjørt snotiliga húsan.

# Høg tilboð til orkuútbygging

**Klæmint Weihe, stjóri í SEV, ásannar, at øll trý tilboðini, sum vórðu latin upp í morgun, eru munandi hægri tað, sum SEV hevur mett, at norðari partur av Eiði 2 fer at kosta**

ORKUÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun hevur lisitatión verið í sambandi við verkætlanina hjá SEV, ið rópt verður "Norðari parturin av Eiði 2".

Trý tilboð vóru upp á hesa verkætlan.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at tilboðið, sum J & K Petersen hevði saman við M.T. Højgaard, var lægst, 50,2 miljónir krónur. Í miðjuni lá tilboðið hjá E. Phil & Søn upp á 52,4 miljónir krónur, og hægsta boð átti NCC, sum var upp á 77,7 miljónir krónur.

### Munandi dýrari

Klæmint Weihe ásannar, at øll trý tilboðini eru munandi hægri tað, sum SEV hevur mett, at henda verkætlanin fór at kosta.

- Eg vil ikki siga nakað tal, men tilboðini eru munandi hægri enn okkara metingar.

Spurdur, um tað eru tíðirnar í dag við nógvum arbeiði á flestu økjum, sum hava trýst prísin upp, heldur SEV-stjórin, at hetta er ikki óhugsandi.

- Jú, tað er væl hugsandi, at nógva virksemið í landinum hevur havt sína ávirkan á tilboðini, sigur hann.

### 4 miljónir kWt

Málið hjá SEV er, at verkætlanin, sum verður rópt norðari partur av Eiði 2, skal geva elfelagnum slakar 4 miljónir kilovattímar (kWt) um árið.

- Verkætlanin er mett at taka hálvt annað ár, og ætlanin er at fara í gongd so skjótt, sum støða er tikin til innkomnu tilboðini. Klæmint Weihe sigur, at fólk hjá SEV nú fara at hyggja at og eftirkanna tilboðini og gera sínar metingar av hesum.

Vit spurdu eisini SEV-stjóran, um tað fer at fáa nakra ávirkan á verkætlanina, at tilboðini eru munandi hægri, enn elfelagið hevði væntað.

- Nei, tað dugi eg ikki at siga. Tað verður stýrið, ið fer at taka endaliga avgerð um, hvussu fram skal farast, sigur hann.

### Árinskanning

SEV arbeiðir eisini við at fremja verkætlanina, ið fevnir um økið frá Norðskála og suður móti Selatrað.

- Hetta er syðri partur av Eiði 2 verkætlanini, sigur Klæmint Weihe.

Hann vísir á, at hetta málið í løtuni liggur hjá friðingarmyndugleikunum.

- Í løtuni verða árinskanningar gjørdar, og ætlandi verða hesar kanningar liðnar til várs, sigur SEV-stjórin.



*- Tað er væl hugsandi, at nógva virksemið í landinum hevur havt sína ávirkan á tilboðini upp á norðara part av Eiði 2, sigur Klæmint Weihe, SEV-stjóri*